

Vit ynskja øllum eina góða Sundalagsstevnu

heilsan

Atlanticpane
Tlf. 42 14 05

# - Ótømandi við

**- Tað vísir seg, at fólk her í bygdini eru sera fegin um málningar mínar. Í Hósvík er ótømandi við motivum, og fólki dámar væl at síggja - og eiga - teirra hús, teirra bát ella kanska teirra gás á einum málning, sigur Adolf Johannesen sum á stevnuni hevur framsýning av verkum sínum í skúlanum**



*- Hósvík er ein ótrúliga vøkur bygd við einum hópi av motivum, sigur Adolf Johannesen, sum her leggur hond á ein av málningunum, sum skal viðá framsýningina um vikuskiftð*

LISTAFRAMSÝNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hósvík:** - Eg havi faktisk málað síðani eg dugdi at ganga!

Ein av teimum sum aftur hesa ferð ætlar at seta sín dám - ella rættari sagt: sínar litir - á Sundalagsstevnuna í Hósvík er klaksvíkingurin, Adolf Johannesen.

Hann hevur búð í bygdini tey seinastu fimm árini. Og hann hevur lagt merki til, hvussu ótrúliga nógv

